# NN FEITA MÁTAN



**KOMIN Á BOTN**

*3 ey seinastu árini hava verið ein spennandi avbjóðing heima hjá Elin og teimum. Nú er bæði el- og oljunýtslan so lág, at hon valla verður lægri.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## 10 tiltøk frá Elin

### 1. Spariperur

**Elin:** Eg havi kannað marknaðin væl og virðiliga, tí tað finnast bæði góðar og minni góðar perur í øllum prísklassum. Nógv bendir á, at prísur og góðska fylgjast. Nú havi eg funnið nakrar, sum eg eri nøgd við. Eg skrivi datoin, tá tær verða settar í, á fatningin, so eg kann fylgja við, hvussu leingi tær halda. Onkur hevur hildið í 10 ár.

### 2. Høvuðsavbrótari

**Elin:** Tá vit umvaldu húsini, fingu vit elektrikaran at installera eina høvuðskontakt á hvørjari hædd, har til ber at sláa allan streym á hæddini frá og til í senn. Her er umráðandi at leggja væl til rættis, til dømis so frystari og køliskáp verða undantikin. Hetta er gott, tá vit fara í song, tí so er alt óneyðugt sløkt.

### 3. Klædnavask- og turk

**Elin:** Vit fylla altíð maskinuna og vaska við so lágum hita, sum til ber. Og so hava vit innrættað ein gamlan hjall við klædnasnórum, umframt at uttandura snóratræið er gjørt høgligari. Turkitrumlan verður so gott sum ongantíð brúkt.



### 4. Spariskinnarar

**Elin:** Líkist einari forleingjaradós við fleiri stikkum í. Perfekt til sjónvarps- og teldu-leidnings-kaos, har tingini ofta standa frá ella á standby.

### 5. Reyða peran

**Elin:** Standby er ein klikkað funktión. Eg skilji ikki, hví tólini skulu vera tendrað, hóast eg havi sløkt tey. Úrslitið er, at eg sløkki á vegginum, har tað ikki er spariskinnari.

### 6. Hvítvørur

**Elin:** Vit gjøgnumgingu allar hvítvørurnar og raðfestu nær tær skuldu skiftast út frá, hvussu nógv tær brendu. Til dømis varð frystiboxin skift út við eitt minni frystiskáp. Nú eru allar hvítvørurnar A-merktar og tað merkir, at tær brenna so lítið sum til ber.

### 7. Ljós

**Elin:** Í sambandi við umvælingarnar í húsinum, hava vit fingið ein glasútbygning á húsini. Hesin gevur nógv ljós og góðan hita til øll húsini, tá sólin skínur. Hetta sparir okkum bæði ljós og olju. Er tað kalt úti, lata vit bara hurðina aftur til útbygningin, so kuldin ikki sleppur inn.

### 8. Reingerð

**Elin:** Vit eiga næstan ongi vaskievni og brúka ikki heitt vatn til vanliga reingerð. Í staðin brúka vit mikroklútar, sum vaska supervæl. Mikroklútar eru nokkso dýrir, men tað loysir seg í longdini. Fáu vaskievnini, sum eru eftir í húsinum, hava øll umhvørvismerking.

### 9. Endurnýtsla

**Elin:** Eg keypti hesa kompostspannina niðri herfyri. Í garðinum stendur ein kompostkassi, sum Dugni hevur framleitt. Alt lívrunnið tilfar endar har, og verður til góða mold til havan.



### 10. Hiti

**Elin:** Vit hava lækka innihitan. Fyri hvørt stig hitin minkar, sparir tú 7 prosent av orkunýtsluni. Eisini ansa vit eftir ikki at brúka ov nógv heitt vatn, til dømis er óneyðugt at skola av, áðrenn tú setir búnýti í uppvaskimaskinuna. Eisini hava vit bjálvað húsini so væl, sum til ber í sambandi við umvælingarnar.